## VODAFONEDEILDIN 19. UMFAR:

### B36 - FC Suðuroy 1-0 (1-0)

Dómari: Rúni Gaardbo

**1-0: Bárður Olsen, 40.**

**B36:** Meinhard Joensen – Jónas Tór Næs, Dmitrije Jankovic, Odmar Færø, Herbert í Lon – Jákup á Borg, Klæmint Matras(liðsk), Bárður Olsen(Fróði Clementsen, 85.), Hjalgrím Elttør – Christian Mouritsen, Stig-Roar Søbstad(Róaldur Jacobsen, 66.)
Gult Kort: Jákup á Borg og Odmar Færø
Venjari: Allan Mørkøre
**FC Suðuroy:** Stanislav Kuzma – Súni úr Hørg, Kasper Schultz, Heini Vatnsdal, Heini Bech – Martin Tausen(Brandur Suðuroy, 89.), Palli Augustinussen(liðsk), Teitur Tausen(Tóki Brattalíð, 74.), Henning Joensen(Kári í Lágabø, 81.) – Jón Krosslá Poulsen, Mamuka Toronjadze
Gult Kort: Súni úr Hørg, Martin Tausen, Heini Vatnsdal, Jón Krosslá Poulsen og Mamuka Toronjadze
Venjari: Jón Pauli Olsen




### B68 - HB 2-2 (2-1)

Dómari: Petur Reinert

**1-0: Øssur Hansen, 10., br**
**2-0: Ahmed Keita, 32.**
**2-1: Hanus Thorleifsson, 34.**
**2-2: Andrew av Fløtum, 94., br**

**B68:** Vlada Filipovic - Niclas Joensen, Jóhan Dávur Højgaard, Pól Jóhannus Justinussen, Øssur Hansen (Kristian Anton Andreasen, 80.) - Jóhan Petur Poulsen, Eli Simonsen, Remi Langgaard, Dánjal Pauli Højgaard (Ibrahima Camara, 82.) - Oddur Højgaard, Ahmed Keita
Gult kort:Ahmed Keita
Venjari: Bill M. Jacobsen
**HB:** Tórður Thomsen - Vagnur Mohr Mortensen, Doddi, Rógvi Holm (Pætur Jørgensen, 34.), Hendrik Rubeksen - Hanus Thorleifsson (Kristian R. Mouritsen, 67.), Levi Hanssen (Páll M. Joensen, 75.), Fróði Benjaminsen, Rógvi Poulsen - Andrew av Fløtum, Rókur Jespersen
Gult kort: Vagnur M. Mortensen
Venjari: Kristján Guðmundsson




### B71 - Víkingur 0-0 (0-0)

Dómari: Lars Muller

**B71:** Predrag Markovic – Jóhannes A. Jensen, Bojan Zivic, Allan Tungá, Tummas Dam Clementsen – Mads A. Hentze, Mikkjal T. Hentze, Danilo Kovacevic, Mario Stanic, Høgni Midjord(Ebbe Kristin Thomsen, 55.) – Tummas Hans Rubeksen(Bogi Hermansen, 69).
Gult kort: Mads A. Hentze, Thomas Hans Rubeksen, Tummas Dam Clementsen, Mikkjal T. Hentze, Bogi Hermansen, Jóhannes A. Jensen.
Venjari: Piotr Krakowski
**Víkingur:** Geza Turi – Sverri Jacobsen, Niclas Niclassen, Erling Jacobsen, Hanus Jacobsen – Sølvi Vatnhamar, Sam Jacobsen, Nenad Stankovic(Kaj Leo í Bartalsstovu, 65.), Bárður Hansen – Páll Klettsgarð, Finnur Justinussen(Hjartvard Hansen, 90.).
Venjari: Jógvan Martin Olsen




### EB/Streymur - NSÍ 1-1 (1-0)

Dómari: Ransin N. Djurhuus

**1-0: Arnbjørn T. Hansen, 8.**
**1-1: Árni Frederiksberg, 85.**

**EB/Streymur:** René Tórgarð – Gert A. Hansen, Egil á Bø, Sorin Anghel, Alex José dos Santos – Gudmund Nielsen (Kristoffur Jakobsen, 55.), Pauli G. Hansen, Brian Olsen (Leif Niclasen, 63.), Hans Pauli Samuelsen (Arnar Dam, 78.) – Daniel Udsen, Arnbjørn T. Hansen
Gult kort: Pauli G. Hansen
Venjari: Heðin Askham
**NSÍ:** Andras Gango – Jónhard Frederiksberg, Johan Troest Davidsen, Jens Joensen, Einar T. Hansen – Bogi Løkin, Jústinus R. Hansen, Jann Ingi Petersen (Debes Danielsen, 46.), Heðin á Lakjuni – Klæmint A. Olsen (Árni Frederiksberg, 78.), Christian Høgni Jacobsen
Gult kort: Jóhan Troest Davidsen, Bogi Løkin, Heðin á Lakjuni
Venjari: Pauli Poulsen




### Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 19 | 12 | 4 | 3 | 43 | 21 | +22 | 40 |
| 2 | HB | 19 | 10 | 5 | 4 | 34 | 23 | +11 | 35 |
| 3 | EB/Streymur | 19 | 8 | 7 | 4 | 36 | 22 | +14 | 31 |
| 4 | Víkingur | 19 | 8 | 7 | 4 | 36 | 25 | +11 | 31 |
| 5 | ÍF | 19 | 9 | 4 | 6 | 34 | 30 | +4 | 31 |
| 6 | B36 | 19 | 7 | 6 | 6 | 31 | 27 | +4 | 27 |
| 7 | B68 | 19 | 5 | 5 | 9 | 27 | 33 | -6 | 20 |
| 8 | B71 | 19 | 4 | 5 | 10 | 16 | 44 | -28 | 17 |
| 9 | FC Suðuroy | 19 | 3 | 5 | 11 | 21 | 38 | -17 | 14 |
| 10 | AB | 19 | 1 | 8 | 10 | 24 | 39 | -15 | 11 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 28. august 2010 | 20 | **B68 - NSÍ** | á Toftum |
| 29. august 2010 | 20 | **B71 - HB** | á Sandi |
| | 20 | **ÍF - FC Suðuroy** | í Fuglafirði |
| | 20 | **EB/Streymur - AB** | í Streymnesi |
| | 20 | **Víkingur - B36** | í Gøtu |




*Andras Gango spældi ein fantastiskan dyst við Margáir mikukvøldið, og honum fyri at takka, var bara eitt mál á muni í hálvleikssteðginum*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

# Frítt spæl við Margáir

**VODAFONEDEILDIN Liðini áttu hvør sín hálvleik, tá EB/Streymur mikukvøldið tók ímóti NSÍ. Heimaliðið átti at havt lagt seg væl á odda fyri steðgin, men í seinna hálvleiki kom NSÍ sterkt aftur og fekk javnleik burturúr, so oddastøðan er óbroytt**

**Hilmar Jan Hansen**

| | |
|---|---|
| EB/Streymur | 1 |
| NSÍ | 1 |

– Hetta úrslitið fáa vit ikki brúkt til nakað sum helst, tí kravið var, at vit skuldu vinna, um vit skuldu hanga í oddanum. NSÍ er eitt so mikið gott lið, at eg trúgvi ikki, at nakar steðgar teimum nú, segði Heðin Askham, venjari hjá EB/Streymi, eftir annan dystin í fimm dagar ímóti oddaliðnum, NSÍ.

– Vit hava verið betra liðið í báðum dystunum, men skorar tú ikki ímóti NSÍ, tá tú hevur kjansirnar, verður tú eisini revsaður. At vit ikki eru á odda 3-0 í hálvleikinum í dag, er bara okkara egna skyld, og tá teir so fáa eitt mál ímóti endanum – ja, hatta er tað, sum hendir í fótbólti.

Tað var eisini næstan løgið, at EB/Streymur ikki fekk tvey ella trý mál aftrat fyrstu 45 minuttirnar, tí í fyrra hálvleiki sat heimaliðið tungt á øllum, sum hendi á vøllinum. NSÍ kom bara hendinga ferð fram um miðjuna, og tá var sjáldan nakar serligur vandi á ferð, meðan EB/Streymur hótti alla tíðina.

Eitt innkast í vinstru síðu, tá góðir sjey minuttir vóru farnir, setti hol á hjá EB/Streymi. Gert A. Hansen kastaði langt inn í NSÍ-brotsteigin, har Gudmund Nielsen við høvdinum snittaði bóltin víðari, og mitt fyri málinum stóð Arnbjørn T. Hansen púra leysur og kundi við pannuni plasera bóltin í málið.

Restina av hálvleikinum hevði EB/Streymur fleiri aðrar stórar kjansir, men hvørja einastu ferð royndist Andras Gango framúr væl í málinum hjá NSÍ, sum hann helt meistarliga reint restina av dystinum.

## Vent í holuni

Í seinna hálvleiki vendi dysturin fullkomuliga á høvdið. Nú var tað NSÍ, sum sat á so at siga øllum og í løtum kringsetti brotsteigin hjá EB/Streymi, ið ikki av álvara kom fyri seg, fyrr tað í yvirtíðini eydnaðist at fáa nøkur vandamikil hornaspørk burturúr í seinastu royndini at vinna dystin.

Leingi lá í luftini í seinna hálvleiki, at NSÍ fór at fáa mál, men tíðin var við at ganga undan, tá tað í fimtsíðsta minutti endiliga bragdaði. Talan var um ein leysan bólt, ið brádliga kom fyri føturnar á innskifta Árna Frederiksberg, ið náðileyst høgdi til, so NSÍ nú ikki hevur tapt í 15 dystum.

– Vit hildu opinbart, at vit bara kundu ganga dystin ígjøgnum, men sótu alt ov lætt í teimum í fyrra hálvleiki, so teir sluppu at gera, sum teimum lysti. Men í steðginum staðfestu vit, at hetta slett ikki bar til, tí vit kundu akkurát tað sama tapa 5-0 sum 1-0, sigur Johan Troest Davidsen hjá NSÍ.

– Nú hava vit spælt tvær ferðir á rað ímóti EB/Streymi, og báðar ferðir fóru vit inn fyri at vinna dystirnar. Men bara ein av hesum fýra hálvleikunum hevur verið nóg góður hjá okkum, so alt í alt eru vit nokk nøgdir við at fáa tveir javnleikir burturúr. Og í dag er 1-1 er eitt fínt úrslit, tá vit hugsa um fyrra hálvleik, tí tá sá einki út hjá okkum.

Eftir stendur, at liðini hvørt í sínum lagi vístu seg frá bæði síni bestu og ringastu síðu. Í fyrra hálvleiki spældi EB/Streymur sítt eyðkenda spæl, tá tað er allarbest, men í seinna hálvleiki var heimaliðið púra fyri ongum. NSÍ byrjaði sum eitt hol í jørðini, men reistist manniliga í steðginum og bleiv við at trýsta, til tað at enda eydnaðist at fáa útjavnandi málið, ið gjørdi, at oddasessurin er líka tryggur, sum hann var tað undan dystinum.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

| | |
|---|---|
| B36 | 1 |
| FC Suðuroy | 0 |

| | |
|---|---|
| B68 | 2 |
| HB | 2 |

| | |
|---|---|
| B71 | 0 |
| Víkingur | 0 |